# Kolvetnisskattur í 4. og 5. útbjóðingarumfari

Í talvuni niðanfyri síggjast útrokningarnar av marginalskatti á kolvetnisframleiðslu í ávíkavist 4. og 5. útbjóðingarumfari.

| **4. útbjóðingarumfar** | | | |
|---|---|---|---|
| | | | |
| **Av +100 kr. í eyka inntøku** | | | |
| | | | |
| **Fara** | **Til** | **Kr.** | **Marginalskattur** |
| 2% | royalty | 2 | 2,0% |
| (100-2)*27% | felagsskatt | 26,46 | 28,5% |
| (100-2-26,46)*10% | eykaskattur 1 | 7,154 | 35,6% |
| (100-2-26,46)*25% | eykaskattur 2 | 17,89 | 46,3% |
| (100-2-26,46)*40% | eykaskattur 3 | 28,62 | 57,1% |

| **5. útbjóðingarumfar** | | | | |
|---|---|---|---|---|
| | | | | |
| **Av +100 kr. í eyka inntøku** | | | | |
| | | | | |
| **Fara** | **Til** | **Kr.** | **Marginalskattur** | **Munur** |
| 0% | royalty | 0 | 0,0% | -2,00% |
| (100-2)*27% | felagsskatt | 27 | 27,0% | -1,46% |
| (100-2-26,46)*10% | eykaskattur 1 | 7,3 | 34,3% | -1,31% |
| (100-2-26,46)*25% | eykaskattur 2 | 18,25 | 45,3% | -1,10% |
| (100-2-26,46)*40% | eykaskattur 3 | 29,2 | 56,2% | -0,88% |

Talvan skal lesast soleiðis:

Í eitt nú 4. útbjóðingarumfari sæst, at royalty er 2%, at felagsskatturin er (100 – 2) * 27% = 26,46%, av tí at royalty fyrst skal dragast frá, áðrenn felagsskatturin verður útroknaður. Um bert royalty og felagsskattur verða goldin, er marginalskatturin 2% + 26,46% = 28,5%.

Í seinastu kolonnu sæst munurin á marginalskattinum í 4. og 5. útbjóðingarumfari. Um eykaskattur 3 verður goldin sæst, at munurin á marginalskattinum bert er 0,88%.